MENTAMÁLARÁÐIÐ

Oktober 2013



# Hvalastøðin við Áir

## Álit um økisskipan



# Innihald

Arbeiðssetningur og nevnd ........ 3
Tilmæli samanumtikið ........ 4
Hvalastøðin í stuttum ........ 5
Hugsanir um virksemi ........ 6
Ávegis tilmæli 2007 ........ 6
Umvælingararbeiði á hvalastøðini ........ 8
Málbólkar ........ 9
Økisskipan ........ 10
Dugni og Brandskúlin ........ 12
Viðv. øki 1: Alment savnsvirksemi ........ 13
Hvalaveiðusavn ........ 13
Sjóvinnusavn ........ 14
Økissavn ........ 18
Vinafeløg ........ 19
Upplivingardepil ........ 20
Viðv. øki 2: Frítíðarvirksemi og vinnuligt virksemi ........ 22
Depil fyri frítíðarvirksemi og ferðavinnu ........ 23
Økisdisponering og byggisamtykt ........ 25
Skipan av savni, tørvur og kostnaðarmeting ........ 27
Bygnaður ........ 29
Tilmæli ........ 30

ISBN-13 978-99918-852-4-7

**Hvalastøðin við Áir**
Álit um økisskipan

*Illustratiónir á forsíðu: Heidi H. Poulsen*

Mentamálaráðið
Hoyvíksvegur 72
100 Tórshavn

Tel 306500
www.mmr.fo
Oktober 2013

# Arbeiðssetningur og nevnd

Í sambandi við arbeiðið at varðveita hvalastøðina við Áir setti landsstýrismaðurin í mentamálum, Bjørn Kalsø, í mai 2012 nevnd at gera eina yvirlitsætlan um upplivingardepil við Áir.

Arbeiðssetningurin hjá nevndini var at orða eitt álit við yvirlitsætlan fyri savnsvirksemi og upplivingardepil við Áir. Yvirlitsætlanin skuldi lýsa skipanina av økinum sum upplivingardepil við:

- hvalastøðini sum savni
- økissavnsvirksemi
- privatum vinnuvirksemi
- meting av íløgum og rakstrarkostnaði fyri savnsvirksemi og upplivingardepil

Nevndin varð sett við umboðum frá Sunda Kommunu, Søvnum Landsins, Landsverki og Mentamálaráðnum. Umboðini í nevndini hava verið:

Andras Mortensen, Søvn Landsins, formaður
Asbjørn Djurhuus, Sunda kommuna
Edvard Hermansen, Sunda Kommuna
Símun V. Arge, Fornminnissavnið
Erland V. Joensen, Fornminnissavnið
Jan Sørensen, Náttúrugripasavnið
Ole Jensen, Landsverk
Armgarð Weihe, Mentamálaráðið

Mentamálaráðið

22. oktober 2013

# Tilmæli samanumtikið

Nevndin mælir til,

- at hvalastøðin við Áir og økið sunnanfyri verða skipað sum ein depil, ið fevnir um savnsvirksemi, frítíðarvirksemi og vinnuvirksemi.
- at virksemið verður samskipað kring maritima umhvørvið á hvalastøðini.

Fyri at røkka hesum verður mælt til,

- at Sunda kommuna broytir byggisamtyktina fyri økið.
- at maritimt savnsvirksemi hjá tí almenna verður staðsett við Áir.
- at virksemið, sum Vinnuháskúlin hevur í økinum, verður flutt.
- at Sunda kommuna og Mentamálaráðið skipa eitt samstarvsráð at samskipa virksemini í økinum.

Útgreinað tilmæli er á síðu 30.



*Hvalastøðin við Áir umleið 1950. Mynd Føroya Fornminnissavn.*

# Hvalastøðin í stuttum

Stórhvalaveiðan í Føroyum byrjaði í 1894, tá Albert Grøn, hvalaveiðumaður úr Sandefjord, kom til Føroya við hvalabátinum Urd fyri at skjóta hval. Norska hvalaveiðan var ein alheims ídnaður, og við tíðini bygdu norðmenn 214 landstøðir ymsastaðni í heiminum, millum teirra 7 í Føroyum. Tríggjar av hesum hvalastøðum eru varðveittar, ein í Albany í Avstraliu, ein í Grytviken á South Georgia og so støðin við Áir.

Hvalastøðin við Áir var bygd í 1905 av Chr. Salvesen sum tann sjeynda og síðsta í Føroyum. Nógv virksemi var har til 1930, tá norðmenn góvust, og støðin lá still til 1936, tá føroyingar tóku yvir. Virksemið helt fram við skiftandi hepni og eigarum fram til endan av 1960-árunum, tá stórhvalaveiðan mest sum steðgaði upp. Tann síðsti hvalurin varð tikin upp á plánin í 1984.

Hvalastøðin við Áir umboðar ein týdningarmiklan part av føroyskari ídnaðarsøgu í 20. øld. Støðin hevði stóran búskaparligan týdning fyri Sundalagið og gav lønt arbeiði í hesum fólkalítla øki.

Í 1982 gjørdi Føroya Fornminnissavn vart við mentanarsøguligu virðini hjá hvalastøðini. Savnið fór undir skrásetingar av øki, bygningum og lutum. Í 1989 gjørdi landsstýrið av, at hvalastøðin er varðveitingarverd, og nøkur ár seinni fekk landsantikvarurin gjørda eina støðulýsing av bygningum. Síðan 1997 hevur Landsverk staðið fyri neyðugum viðlíkahaldi.



*Hvalastøðin við Áir 2013. Mynd Armgarð Weihe.*

# Hugsanir um virksemi

## Ávegis tilmæli 2007

Í ávegis tilmæli frá 2007 varð víst á, at hvalastøðin við Áir er varðveitingarverd sæð út frá føroyskari eins og alheims ídnaðar- og sjóvinnusøgu í 20. øld. Eisini er hvalastøðin við Áir varðveitingarverd sæð úr mentanarsøguligum sjónarhorni. Í ávegis tilmælinum varð tí skotið upp,

- at farið verður undir varðveiting av hvalastøðini við Áir við tí endamáli, at hvalastøðin verður skipað sum savn.
- at økið við Áir verður skipað sum ein depil fyri ferðavinnu og mentanarsøguligum upplivingum við serligum atliti at sjóvinnu.
- at virksemið verður skipað í samstarvi millum land, kommunu og privata vinnu.

Høvuðsatdráttirnir í upplivingardeplinum er hvalastøðin, ið verður gjørd til antikvariskt aktiv og livandi savnsvirksemi við atliti at føroyskari sjóvinnu í modernaðari tíð, t.e. eftir 1856. Harumframt verður skipað mentanarsøguligt savn fyri Sunda kommunu.

Hentleikar so sum ráðstevnuhøli, gistingarmøguleikar, matstovuvirksemi, havnahentleikar hjá frítíðarsiglarum, campingpláss, útleigan av smábátum og smáttum eiga at verða knýttir at deplinum.

Fyri at fáa sum mest burturúr, er tað av stórum týdningi, at bæði land, kommuna og vinna eru við í verkætlanini.



*Úr álitinum frá 2007: Upplivingardepil við Áir. Illustratión Heidi H. Poulsen.*

Skotið varð upp,

- at landið hevur ábyrgd av antikvariskum viðurskiftum viðv. bygningavarðveiting og sjóvinnusamlingum og ber kostnaðin av teimum.
- at kommunan hevur ábyrgd av mentanarsøguligum økissavni í samstarvi við landið, sbr. løgtingslóg um bygdasøvn.
- at virksemið í mestan mun rakstrarliga verður skipað eftir vinnuligum fortreytum, tó so at landið ber kostnaðin av, at virksemið hvílir á fakliga hollari grund.
- at kommunan hevur ábyrgd av undirstøðukervi, t.e. atkomu og klárgering av økjum til camping- og havnahentleikar. Kommuna og vinna samstarva um at brúka undirstøðukervi.
- at íløgur í camping- og havnahentleikar og rakstur av teimum verða skipaðar eftir avtalu millum kommunu og vinnu.
- at bygningar, sum metast vera liður í undirstøðukervinum og eru landsogn, verða útleigaðir til vinnufyritøkur, ið virka í økinum.

Hvalastøðin verður umvæld eftir antikvariskum forskriftum og skipað sum sjóvinnusavn. Antikvariska virðið í altjóða høpi verður marknaðarført. Hvalastøðin er ein av teimum heilt fáu, ið eru eftir í heiminum, og hin einasta, ið er varðveitt á norðaru jarðarhálvu. Løgtingsfriðing verður lýst fyri hana.

Tól og annað, ið er til skjals á støðini, verður umvælt við atliti at framsýningarvirksemi og interaktivum upplivingum. Tá antikvariska umvælingin er liðug, skal hvalastøðin kunna geva teimum vitjandi eina livandi uppliving av einum globalum ídnaði í farnari tíð. Landið fíggjar umvælingina í samstarvi við útlendskar grunnar. Fakliga virksemið er undir eftirliti av landsantikvarinum, og savnið kann hava mentanarsøguligar lutir, sum eru landsogn, í varðveitslu. Harumframt kann sýnast fram lívfrøðiligt savnstilfar við atliti at stórhvalaveiðu og sjóvinnu føroyinga annars.

Gjørd verður høll í økinum, sum kann hýsa hesum virksemi. Høllin verður gjørd soleiðis, at møguleiki er fyri at sýna fram bátar, skip og aðrar lutir úr modernaðu sjóvinnusøguni.

Útiumhvørvið verður eisini nýtt í framsýningarvirkseminum, bæði á landi og á sjónum. Atløgubryggja verður til antikvarisk skip uttan siglingarloyvi.

Landið fíggjar íløgurnar í sjóvinnusavnsvirksemið í samstarvi við útlendskar grunnar, og raksturin verður fíggjaður av landinum og egnum inntøkum.

Økissavn verður savn fyri Sunda kommunu. Savnið verður skipað eftir løgtingslóg um bygdasøvn. Ein partur av høllini, ið verður nýtt til sjóvinnusavn, verður settur av til økissavnið. Økissavnið skal lýsa mentanarsøgu bygdannna í kommununi, og harumframt týdningin, ið stórhvalaveiðan hevði fyri Sundalagið, har tríggjar av teimum sjey hvalastøðunum í Føroyum vóru, og fyri Føroyar annars.

Rakstrarliga og fakliga virkar økissavnið í samstarvi við landssavnið, og saman virka tey í samstarvi við ferðavinnuna fyri, at mentanar- og náttúrusøguligu tilboðini verða spennandi og livandi fyri tey vitjandi.

Kommunalt og vinnuligt virksemi er knýtt at deplinum, eitt nú campingpláss, útleigan av smábátum, matstovuvirksemi og annað.

# Umvælingararbeiði á hvalastøðini

Løgtingið játtaði í 2011, 2012 og 2013 tilsamans 6 mió. kr. til bráðfeingis viðlíkahald av hvalastøðini við Áir og til fyrireikingararbeiðið í sambandi við skipan av økinum sum ein depil fyri ferðavinnu og mentanarsøguligum upplivingum.

Bráðfeingis viðlíkahaldinum hava Søvn Landsins staðið fyri í samstarvi við Landsverk, sum umsitur bygningarnar við Áir. Viðlíkahaldsarbeiðið hoyrir ikki við til nevndaruppgávuna í sambandi við skipan av økinum, men nevndin er støðugt kunnað um gongdina í umvælingararbeiðinum.

Endamálið við bráðfeingis viðlíkahaldsarbeiðinum er at tryggja bygningarnar, fáa teir tættar og steðga forfalli, skráseta teir antikvariskt og skipa varðveitslu av útgerð, og ikki at leggja nakað afturat bygningunum so sum at innrætta teir til savn. Játtanirnar í 2011 og 2012 vóru latnar við átekning um, at landsstýrismanninum verður heimilað at flyta óbrúkta játtan til seinni fíggjarár. Av teimum 6 mió. kr., sum vórðu játtaðar í 2011, 2012 og 2013, vóru 3,2 mió. kr. tøkar við ársbyrjan 2013. Hesar verða nýttar til ráðlegging í sambandi við økisdisponering, antikvariska skráseting, bygningafrøðiliga ráðgeving og eftirlit og umvæling av nøkrum av høvuðsbygningunum kring plánin, nevniliga Tørkuni og Kvernhúsinum (8), Spikkókarínum (11), Titan (13), Kristnastovu (9) og Fuguni (10).



Í talvuni niðanfyri sæst metti kostnaðurin fyri bráðfeingis umvælingar fram til árslok 2013, og síðan er mett um kostnaðin av framhaldandi bráðfeingis umvælingunum (mettur kostnaður í 2013):

| | | |
|---|---|---|
| Nýtsla 2011-2012-2013 | | 6.000.000 |
| Endurgerð av Tørkuni og Kvernhúsinum (8), meting | 1.100.000 | |
| Ketilshúsið (6) | 770.550 | |
| Skarv (7) | 77.000 | |
| Eldsmiðjan (Verkstaður o.a.) (12) | 445.500 | |
| Grísahúsið og Krúthúsið (1 og 17) | 106.700 | |
| Laboratoriið (2) | 275.000 | |
| Perlan (3) | 530.750 | |
| Ebenezer (4) | 269.500 | |
| Kemis (5) | 544.500 | |
| Uttanumøki, Planurin o.a. (15) | 1.617.000 | 5.736.500 |
| Tilsamans (u/mvg) | | 11.736.500 |

Húsini verða umvæld soleiðis, sum tey vóru, og einki verður lagt afturat. Hetta er tað bíligasta, bæði í sambandi við íløgur og framtíðar rakstur, og eisini sannast, tá hugsað verður um hugsjónir í sambandi við antikvariska umvæling. Húsini koma sostatt ikki at vera upphitað ella bjálvað, og hugsanin er, at tey í sær sjálvum skulu kunna veita teimum vitjandi eina uppliving av virkseminum. At húsini koma at standa óupphitað, eins og tey altíð hava, setir serlig krøv til framsýningarvirksemið í bygningunum, og roknast má við, at tað harumframt verður neyðugt við upphitaðum bygningum at hýsa tí museala virkseminum.

## Málbólkar

Í sambandi við virksemið, sum miðað verður eftir at hava í økinum, er neyðugt at gera sær greitt, hvørjum málbólkum miðað verður eftir at røkka.

Nevndin metir, at málbólkarnir, ið miðast skal eftir at røkka, í grundini er almenningurin yvirhøvur. Tilboðini røkka frá savnsupplivingum til frítíðarupplivingar, sum styðja upp undir hvørt annað, í og við at alt so ella so er tengt at sjónum. Hugsað verður um skúlaflokkar, ferðafólk og serliga fólk, ið eiga bát ella hava áhuga fyri sjóítrótti, handilsfólk, ið síggja møguleikar í hesum, familjur við børnum, ið hava hug at leiga seg inn eitt vikuskifti, onnur áhugað, eitt nú pensionistar, ið sjálvboðin hava hug at hjálpa til í varðveitingararbeiðinum, skúlabørn á setursskúla, fólk í nærøkinum og so tey, sum á ferðini eftir landsvegnum fáa hug at steðga á til eina uppliving í egnum landi.

# Økisskipan

Nevndin, sum var sett í 2012 og hevur sum uppgávu at gera eina yvirlitsætlan yvir upplivingardepil við Áir, hevur mett um hugsjónirnar frá 2007 og tekur yvirskipað undir við teimum. Á hesum støði hevur hon tí gjørt sær neyvari metingar um, hvussu farast kann fram.

Yvirskipað varð í ávegis álitinum frá 2007 skotið upp, at virksemið í sambandi við hvalastøðina við Áir skuldi vera býtt upp í tveir partar:

1. Alment savnsvirksemi, tvs.
   a. antikvarisk umvæling, fyriskipað av landinum.
   b. savnsvirksemi, fyriskipað av landinum.
   c. savnsvirksemi, fyriskipað av kommununi við stuðli frá landinum.

2. Frítíðarvirksemi og vinnuligt virksemi, tvs.
   a. handilsligt virksemi, ferðavinnuvirksemi og frítíðarvirksemi, har kommunan fyriskipar karmarnar.

Á hesum grundarlagi eru umráðingar um økisskipan gjørdar.

Økið kring hvalastøðina fevnir um hesi matrikulnummur í markatalsbygdini Hósvík, og virksemið fevnir um hesi endamál:

| **Matr. nr.** | **Eigari** | **Vídd í $m^2$** | **Økisnýtsla nú** |
|---|---|---|---|
| 4a | 7a = Føroya Jarðargrunnur | 10.575 | Landbúnaðarøki |
| 100 | Føroya Landsstýri | 18.620 | Hvalastøð, Vinnuháskúlin (brandskúli), Dugni (skúli og umskúling) |
| 101b | Hósvíkar kommuna | 27.183 | Ídnaðarøki sbrt. gamlari byggisamtykt |
| 7f | Føroya Jarðargrunnur | 3.363 | Landbúnaðarøki |




Við støði í hesum metir nevndin, at økið kring hvalastøðina við Áir yvirskipað eigur at verða skipað eftir, hvar tað almenna savnsvirksemið skal vera, og hvar tað privata virksemið skal vera. Harumframt meta vegamyndugleikar landsins, at um ætlaða virksemið við Áir elvir til munandi meira ferðslu og harvið ferðsluvanda, eigur ein nýggj íbinding í landsvegin at verða gjørd 100 m longur suðuri.

Nevndin mælir tí til,

1. at tað almenna savnsvirksemið verður í øki 1, sum umfatar matr. nr. 4a og 100.
2. at tað vinnuliga virksemið verður í øki 2, sum umfatar matr. nr. 101b.
3. at møguleiki skal vera fyri at flyta íbindingina í landsvegin umleið 100 m longur suður.

Hesi virksemi verða útgreinað á næstu síðu.

## Dugni og Brandskúlin

Í sambandi við uppskot um økisskipan er neyðugt at taka støðu til framtíðar nýtslu av Nýggjahúsi frá 1949, har Dugni hevur skúla, og Brandskúlan, sum í 1983 var bygdur, har Búðin til tá hevði staðið. Báðir bygningar standa í øki 1, sum í uppskotinum er ætlað til alment savnsvirksemi.

## Dugni

Nýggjahús frá 1949 var manningarhotell fyri arbeiðsfólkini á hvalastøðini. Dugni hevur skúlavirksemi í bygninginum og hevur í 2012 í samstarvi við Landsverk gjørt tilbygging til Nýggjahús, sum higartil var væl varðveitt. Nevnda tilbygging hóskar illa inn í antikvarisku heildina, men tænir virkseminum hjá skúlanum.

Nevndin metir ikki, at virksemið í skúlanum hjá Dugna er í andsøgn við uppskotið at hava alment savnsvirksemi í økinum, og kann tað vera ein fyrimunur við fjøltáttaðum virksemi. Hugsast kann eisini, at skúlin fær nyttu av savnsvirkseminum gjøgnum tænastuveiting til vitjandi, eitt nú við útleigan um summarið, tá skúlin hevur frí, kaffisølu o.t. Um Dugni flytur virksemi sítt, eigur bygningurin at verða nýttur í almenna savnsvirkseminum.

Nevndin mælir tí til,

- at virksemið hjá Dugna við Áir ikki verður ávirkað av ætlanini, sum verður skotin upp.
- at um virksemið hjá Dugna flytur, verður bygningurin nýttur í almenna savnsvirkseminum.

## Brandskúlin

Brandskúlin er partur av virkseminum hjá Vinnuháskúlanum. Bygningurin hjá Brandskúlanum var bygdur í 1983, har Búðin til tá hevði staðið. Búðin var ein goymslubygningur á hvalastøðini. Nevndin metir, at virksemið á Brandskúlanum er í andsøgn við uppskotið at hava alment savnsvirksemi í økinum. Fyri ein part nýtir Brandskúlin (fyrrv. Búðin, bygningur nr. 19) tveir av bygningunum á hvalastøðini, sum kunnu verða nýttir í savnsvirkseminum, til útgerð, og fyri ein part er ikki verandi í økinum vegna royk, tá brandvenjingar eru. Eisini skal nevnast, at bygningurin hjá Brandskúlanum ikki er í góðum standi, tí undirlendið søkkur.

Nevndin mælir tí til,

- at virksemið hjá Brandskúlanum verður flutt.
- at bygningurin, har Brandskúlin hevur hildið til (bygningur nr. 19), verður tikin niður, og nýggjur bygningur bygdur, sum hóskar betur til umhvørvið á hvalastøðini og er nýtiligur til savnsvirksemi.

## Viðv. øki 1: Alment savnsvirksemi

Í ávegis álitinum frá 2007 varð skotið upp, at savnsvirksemið á hvalastøðini fyri ein part skuldi vera landssavn um hvalaveiðu og sjóvinnu í Føroyum, har hvalastøðin verður liður í framsýningunum og fyri ein part økissavn. Í ávegis álitinum eru fyritreytirnar fyri tílíkum virksemi ikki útgreinað. Nevndin hevur við støði í greiningum hjá savnsfólkunum í henni gjørt sær hesar metingar.

## Hvalaveiðusavn

Ídnaðarumhvørvið á hvalastøðini er natúrligi kjarnin í einum hvalaveiðusavni. Í fleiri av bygningunum og á anlegginum annars eru tól og innrætting varðveitt og geva í sjálvum sær tí vitjandi eina sanna uppliving av farnari tíð og týdningin av henni.

Í øðrum bygningum eru tól og innrætting burturbeind og einans húsini eftir. Við teirri antikvarisku umvæling, sum er ætlað, har bygningarnir verða umvældir soleiðis, sum teir vóru, uttan at leggja nýtt afturat, fara hesir bygningar at vera egnaðir til ymist savnsvirksemi, so sum livandi verkstøð, felagshús, smærri framsýningar og goymslur til tilfar, ið tolir rátt umhvørvi.

Mett verður ikki, at nakar av hesum bygningum er egnaður at innrætta til skrivstovuhøli ella starvsstovur til savnsvirksemið.

Myndin niðanfyri sýnir, í hvørjum bygningum gomul innrætting er varðveitt, og í hvørjum bygningum gomul innrætting ikki er varðveitt.



## Sjóvinnusavn

Sjóvinna hevur verið høvuðsvinna føroyinga síðan umleið 1890, t.e. um sama mundið sum norska stórhvalaveiðan tók seg upp. Hóast tíðin síðani hevur verið ein tíð við stórum búskaparligum broytingum fyri føroyska samfelagið, so hava møguleikar ikki verið veittir fyri at skipa museala innsavning fyri at tryggja materiella mentanararvin úr henni. Hetta eiga vit at lata eftirkomarar okkara kunna fáa innlit í, meðan tíð enn er. Tørvur er sostatt á at skipa eitt sjóvinnusavn í Føroyum at lýsa tíðina við ídnaðarbúskapi. Sjóvinna er gagnnýtsla av náttúru. Í sjóvinnusavnsvirksemi er sjólívfrøði tí ein natúrligur partur. Hetta eigur eisini at verða havt í huga, um sjóvinnusavn verður skipað.

Nevndin mælir til,

- at alment sjóvinnusavn verður staðsett í sambandi við hvalasavnsumhvørvið við Áir.
- at sjóvinnusavnsvirksemið verður skipað undir Søvnum Landsins.
- at sjólívfrøði verður hugsað inn í sjóvinnusavnsvirksemið.

Um sjóvinnusavnsvirksemi skal vera við Áir, krevur tað umstøður at virka, sum í løtuni ikki eru. Tørvur er tí á, at bygt verður til endamálið, bæði skrivstovur, starvsstovur, framsýning og goymslur. Í sambandi við goymslur skal nevnast, at gripatilfarið í sambandi við sjóvinnu og ídnað mangan er stórt í vavi og kann umfata alt frá vanligum fiskiamboðum til trol, flakavirkisamboð, bátar og kanska eisini skip.





*Flensburger Schiffahrtsmuseum og Fiskeri- og Søfartsmuseet í Esbjerg. Myndir Armgarð Weihe.*

Spurningurin um høli eigur tí at verða viðgjørdur við støði í hesum fjøltáttaða tørvi, sum í høvuðsheitum snýr seg um a) eina hjalslíknandi goymslu til bátar og annað stórgóðs, ið varðveitist í lutfalsliga ráum klima, b) eina turrgoymslu og amboðshøll við hitaskipan og hóskandi klimastýringum, c) eina framsýningarhøll og d) ein fyrisitingarbygning við skrivstovum og starvsstovum. Eisini eigur at verða sett av e) eitt øki til at seta stórlutir uttandura, sum kann vera liður í framsýningarvirkseminum.

Nevndin mælir tí til,

- at sjóvinnusavnsvirksemið verður staðsett í øki 1 sunnan fyri ánna, t.e. í økinum, har Brandskúlin nú stendur.
- at tað í økinum og møguliga í grannaøkinum (øki 2), sum kommunan eigur, verða bygd a) ein hjalslíknandi goymsla til bátar og annað stórgóðs, ið varðveitist í lutfalsliga ráum klima, b) ein turrgoymsla og amboðshøll við hitaskipan og hóskandi klimastýringum, c) ein framsýningarhøll og d) ein fyrisitingarbygningur við skrivstovum og starvsstovum. e) Eisini mælir nevndin til, at eitt øki verður sett av til at seta stórlutir uttandura, sum kann vera liður í framsýningarvirkseminum.





*Fiskeri- og Søfartsmuseet í Esbjerg. Myndir Ole Jensen.*



*Opið hús við Áir, sept. 2011. Mynd Tórálvur Weihe.*




*Økisskipan. Illustratión Heidi H. Poulsen.*


Øki 1

## Økissavn

Sunda kommuna, sum var skipað í 2005, fevnir um bygdirnar Hósvík, Streymnes, Hvalvík, Saksun, Langasand, Haldórsvík, Tjørnuvík, Oyri, Oyrarbakka, Norðskála og Gjógv. Í hesum bygdum búðu um ársskiftið 2012/2013 1638 fólk. Hóast Sunda kommuna er ein samanløgd kommuna, sum fevnir um stórt øki og fleiri bygdir, finst einki landsgóðkent bygdasavn, tvs. savn, ið virkar eftir Løgtingslóg nr. 17 frá 9. mai 1972 um bygdasøvn við mentanarsøguligum týdningi, í kommununi.

Ikki færri enn 4 norskar hvalastøðir vóru í økinum kring Sundalagið fyrst í 20. øld: Á Signabø, við Áir, á Gjánoyri og í Funningsfirði. Hvalaveiðan hevur tí havt stóran týdning fyri økið og menningina av tí. Eisini hevur økið hýst øðrum týðandi sjóvinnuhættum, so sum alivinnu, skeljafiskiskapi og síðstu árini eisini frálandavinnu, umframt vanligum bátaútróðri og skipsfiskiskapi. Sundalagið kann tí metast sum eitt kjarnuøki í føroyskari vinnu- og ídnaðarsøgu, sum kommunan kann leggja dent á í sjálvslýsing síni. Harumframt er í kommununi varðveittur sermerktur mentanararvur úr tí gamla bóndasamfelagnum, sum eisini hevur týdning fyri landið, t.d. bygdarumhvørvini í Tjørnuvík og við Gjógv eins og Dúvugarðar í Saksun, har landið í løtuni rekur framsýningarvirksemi.

Savnsvirksemið eftir bygdasavnslógini er vanliga grundað á sjálvboðið arbeiði í bygdunum, ofta skipað í bygdasavnsfeløgum. Í Sunda kommunu eru sum nevnt fleiri bygdir, og hugsast kann, at fleiri bygdasavnsfeløg verða stovnað, at røkja lokal áhugamál. Eitt nú er tílíkt felag sett á stovn við Gjógv. Bygdasavnslógin heimilar ikki, at fleiri bygdasøvn verða góðkend í somu kommunu. Hetta forðar kortini ikki fyri, at fleiri bygdasavnsfeløg stuðla einum felags savni, bæði fíggjarliga og við sjálvbodnum arbeiði við atliti at mentanararvinum í tí einstøku bygdini.

Tey mest framkomnu bygdasøvnini í Føroyum hava lønta arbeiðsmegi eisini. At savnsupp-gávan verður framd á yrkisligum grundarlagi er avgerandi fyri dygdina av savnsarbeiðinum og úrtøkuni úr tí. Yrkisligt savnsvirksemi snýr seg sambært altjóða viðurkendum yrkisreglum um innsavning, skráseting, varðveiting, gransking og miðlan og setir treytir um fakligan førleika.



*Økissavnið er staðsett á hvalastøðini. Illustratión Heidi H. Poulsen.*

Nevndin mælir til,

- at eitt bygdasavn verður skipað í Sunda kommunu eftir bygdasavnslógini.
- at ein savnvørður verður settur eftir vanligum fakligum treytum fyri savnsvirksemi at stíla fyri bygdasavnsvirkseminum, sum eisini umfatar at røkja mentanararvsáhugamálini hjá bygdunum í kommununi.
- at bygdasavnið verður staðsett á hvalastøðini við Áir.
- at uppgávan hjá bygdasavninum verður at lýsa søguna hjá kommununi og bygdunum í kommununi úr elstu tíð, men við serligum denti á ídnaðarsøguna.
- at økissavnsvirksemið í mestan mun verður samskipað við sjóvinnusavnsvirksemið hjá Søvnum Landsins.

## Vinafeløg

Bæði í uppgávuni at varðveita hvalastøðina, serliga tólini í henni, og í økissavnsvirkeminum í sambandi við mentanararv í bygdunum, er tørvur á at kunna nøra um vinafeløg, ið kunnu stuðla virkseminum við sjálvbodnum arbeiði. Hetta er ein týðandi uppgáva, sum eigur at verða innhugsað í fyriskipanina av savnsvirkseminum, bæði hjá Søvnum Landsins og økissavninum.

Í sambandi við fysisku planleggingina eigur at verða lagt upp fyri hesum við at seta av góðar umstøður til vinafeløgini at virka í, bæði felagshøli og serliga verkstaðshøli, ið hava umstøður at bjóða vitjandi inn, meðan arbeitt verður.





*Fiskeri- og Søfartsmuseet Esbjerg. Mynd Armgarð Weihe.*



*Helst smiðjan á Gjánoyri. Mynd Føroya Fornminnissavn.*

## Upplivingardepil

Í ávegis álitinum frá 2007 verður skotið upp, at hvalastøðin við Áir skal skipast sum sjóvinnusavn og “depil fyri ferðavinnu og mentanarsøguligum upplivingum við serligum atliti at sjóvinnu”.

Hvat liggur í hesum, er ikki greinað í ávegis álitinum; men grundhugsjónin er, at ein vitjan á savninum skal ”kunna nøra um hugflog og medvit teirra, ið vaksa upp í Føroyum í dag”.

Mong sløg av upplivingum kunnu hugsast í eini vitjan á hvalastøðini, summar sansaligar, summar sosialar, summar innlærandi o.s.fr. Bara tað at vitja eitt ídnaðarminni frá eini farnari tíð er ein uppliving í sær sjálvum, og hon kann síðan kryddast við luktum, ljóði, undirvísing, at síggja smiðir umvæla eina maskinu, og mangt annað, meðan tú gongur runt og eygleiðir.

Í hesum liggur, at endamálið við savnsvitjanini er at veita samfelagskunnandi og undirhaldandi miðlan. Hetta er ein stór námsfrøðilig avbjóðing, sum eigur at verða tikin í stórum álvara, skal hon eydnast. Tað snýr seg um at skipa vitjanina á slíkan hátt, at hon bæði er námsfrøðiliga avbjóðandi, álítandi eins og hon er undirhaldandi og gevur møguleika fyri at hugna sær saman við vinfólkum. Kanska kundi lýsingin sæð nakað soleiðis út:

> *Vitja hvalastøðina, far á kanningarferð í teimum krókutu húsunum við oljudálkaðum maskinum og áður spríkjandi ketlum, far gjøgnum skýmligar gongdir undir kvarnadekkinum inn í mjølverksmiðjuna og fylg framleiðslutilgongdini frá stórhvali til turrevni. Tey gomlu tólini og dampspølini eru sett í stand, og framsýnd verða lutir, søgur og myndir frá tíðini, tá stórhvalaveiðan hevði serligan týdning fyri økið og var liður í menningini av føroyska ídnaðarsamfelagnum síðst í 19. øld. Á planinum liggur ein hvalur, nú eftirgjørdur úr glastrevjum. Umhvørvið guvar av farnari tíð, og lýsilukturin rívur enn í næsar. Bryggjan er umvæld, og í friðsæla umhvørvinum verður løtan notin við einum kaffimunni, við eygleiðing av bátum útfyri, sum kunnu leigast sunnan fyri støðina.*






*Hvalastøðin við Áir. Myndir Armgarð Weihe og Erland V. Joensen. Fiskeri- og Søfartsmuseet í Esbjerg og Southern Actor, Hvalfangstmuseet í Sandefjørd. Myndir Ole Jensen.*

Í sambandi við hvalastøðina sum upplivingardepil kann ein hugsa sær hesi ítøkiligu tilboð:

- Móttøka, harundir museumshandil, wc, garderoba.
- Framsýningar, harundir hvalaveiðusavn, sjóvinnusavn, náttúrusavn.
- Goymslur, harundir "opnar" goymslur, sum tað ber til at vitja, og aðrar goymslur.
- Plánurin er miðpunktið á hvalastøðini. Har skal uppskurður av hvali onkursvegna kunna upplivast, t.d. við einum hvalamodelli.
- Lokalur og globalur mentanararvur. Undir eini vitjan kunnu nógv ymisk evni verða miðlað, úr tí lokala til tað globala. Tann lokala søgan snýr seg m.a. um vinnulívið í Sundalagnum gjøgnum tíðina, so sum søgan um skeljavirkið, alingina, shipping. Perspektivið kann eisini vera víðari til m.a. at umfata sjóvinnusøgu Føroya, norska hvalaveiðusøgu og ta globalu ídnaðargerðina, har hvalaveiðan var ein partur.
- Perspektiveringin kann eisini gerast úr sosialsøguligum sjónarhorni, t.d. við lýsing av lagnum hjá fólki í ídnaðarvinnuni gjøgnum tíðina og broytingunum av teimum sosialu viðurskiftunum, sum moderniseringin hevði við sær.
- Náttúrusøga og vernd. Eisini kunnu kjakspurningar verða viðgjørdir og miðlaðir, t.d. um tilfeingisrøkt, djóravernd, oyðing av stovnum. Miðlanin kann eisini umfata hvalahagtøl, ferðingarmynstur hjá hvali, o.s.fr.
- Lívið í sjónum, akvarium.
- Hvalabátur. Møguleiki er fyri at sýna fram ein gamlan íslendskan hvalabát við Áir, annaðhvørt á sjónum ella á landi, helst tað seinna. Havast má kortini í huga, at varðveiting av einum gomlum skipi er ein tung fíggjarlig byrða.
- Post- og mjólkabáturin Reynir, sum sjálvboðin í Sundalagnum ætla at umvæla, kundi í sigling við ferðafólki havt støð við Áir.







*Hvalfangstmuseet í Sandefjord. Myndir Ole Jensen og Armgarð Weihe. Hvalastøðin við Áir. Mynd Armgarð Weihe.*

## Viðv. øki 2: Frítíðarvirksemi og vinnuligt virksemi

Omanfyri mælti nevndin til, at tað vinnuliga virksemið verður í øki 2. Ánari av øki 2 (matr. nr. 101b) er Sunda kommuna, sum tí eisini varðar av, hvussu økið verður nýtt. Í byggisamtykt fyri Hósvík, økið við Áir, fyri tíðina 2002-2013, er eitt øki við Áir upp á 2,3 ha avlagt til ídnað. Eftir kommunusamanleggingina í 2005 er nýggj byggisamtykt gjørd fyri Sunda kommunu. Í byggisamtyktini, sum er fyri tíðina 2010-2014, eru ásetingar ikki gjørdar fyri økið við Áir.

Í tilmælinum frá 2007 varð mælt til, at økið við Áir verður skipað sum ein depil fyri ferðavinnu og mentanarsøguligum upplivingum við serligum atliti at sjóvinnu, og at virksemið verður skipað í samstarvi millum land, kommunu og privata vinnu.

Nevndin tekur undir við hesum, men skoytir uppí, at økið eisini eigur at kunna verða skipað til frítíðarvirksemi, sum er knýtt at sjónum.

Nevndin metir, at verandi byggisamtykt fyri kommunala økið við Áir ikki samsvarar við tilmælið um hvalastøðina og økið kring hana sum ferðavinnudepil og eigur tí at verða broytt. Eisini metir nevndin, at neyðugt er við serligum reglum fyri bygging og skilhaldsreglum fyri virksemið í øki 2, so at tað, ið bygt verður, hóskar inn í tað mentanarsøguliga umhvørvið við hvalastøðini sum miðdepli.

Nevndin mælir tí til

- at økið 2 við Áir verður skipað sum ein depil fyri frítíðarvirksemi knýtt at sjónum, ferðavinnu og mentanarsøguligum upplivingum við serligum atliti at sjóvinnu.
- at tað vinnuliga virksemið í øki 2 verður skipað soleiðis, at tað samsvarar við málið at skipa ein depil fyri frítíðarvirksemi og ferðavinnu.
- at byggisamtykt fyri økið verður tillagað samsvarandi.
- at gjørdar verða serligar reglur fyri bygging og skilhaldsreglur fyri virksemið í økinum.





*Bátasmíð og hugni. Myndir Ole Jensen og Erland V. Joensen.*



*Museumswerft Flensburg. Mynd Armgarð Weihe.*

## Depil fyri frítíðarvirksemi og ferðavinnu

Sundalagið er eftir føroyskum viðurskiftum sjáldsama væl egnað til frítíðarvirksemi, sum er knýtt at sjónum. Hetta er orsakað av, at lítil og eingin streymur er sunnan fyri Streymin heilt suður móti Hoyvíkshólmi. Eisini er Sundalagið væl vart fyri havaldu og er at kalla eitt innanskers øki, ið er lutfalsliga trygt at ferðast í. Fjøllini báðu megin á Streymoy og Eysturoy skapa eisini serlig vindviðurskifti, sum skapa møguleikar fyri sigling við seglum og øðrum sjóítróttum sum til dømis vindsurfing og drekasurfing. Eisini eru góðir møguleikar fyri øðrum frítíðarvirksemi so sum at fiska og kava. Eitt nú vóru stórhvalarov av hvalastøðini søkt í sundinum og liggja í mongum førum ikki djúpri enn tað ber til hjá frítíðarkavarum at kava niður á tey. Allir hesir frítíðarmøguleikar á sjónum geva eisini møguleikar fyri ferðavinnu og geva íblástur til, hvussu øki 2 kann verða skipað fyri at røkka málinum um depil fyri frítíðarvirksemi og ferðavinnu.

"Ferðist í egnum landi", er eitt slagorð hjá ferðavinnuni, og seinastu árini tykist tað hava vunnið alt størri frama. Fólk fáa sær campingvognar og húsbátar at ferðast við í egnum landi. Fólk skipa seg í feløg, og hjá mongum snýr tað seg um at hittast og savnast um felags áhuga, annaðhvørt tað er í báti ella bili. Eitt nú er regattasigling vorðið eitt væl umtókt frítíðarítriv, millum annað í Sundalagnum. Eisini et áhugi fyri at sigla við seglum í føroyskum bátum.

Umstøðurnar til tílíkt frítíðarvirksemi eru kortini misjavnar. Havnarpláss eru ikki altíð løtt at fáa fatur á, trupult er at taka bátarnar upp til viðlíkahald, og allarhelst er tørvur á støðum at seta bæði bátar og campingvognar um veturin, tá teir mangan verða lítið brúktir. Eisini er tørvur á neystum, serliga hjá teimum, sum hava føroyskar bátar. Hesir tørvir geva møguleikar og kunnu eisini verða støði undir vinnu, til dømis umvæling av bátum, handli við bátaútgerð, máling, útleigan av bátum, útgerð til kaving og surfing og mangt annað.

Í øki 2 við Áir eru góðir møguleikar at skapa umstøður fyri tílíkum frítíðar- og vinnuvirksemi, sum eisini skapar umstøður fyri ferðavinnu. Møguleikar eru fyri neystabygging, havnabygging, skipan av uppháling og vetrargoymslu av bátum og campingvognum, bygging av smáttum til útleigan, skipan av hølisumstøðum fyri felagsvirksemi, skipan av umstøðum fyri camping, smáhandli og øðrum atknýttum vinnuligum virksemi so sum matsølu, matstovuvirksemi, sølu av brennievni til bátar, o.ø.




*Øki 2: Vinnuligt virksemi. Illustratión Heidi H. Poulsen.*

Í sambandi við øki 2 kann ein hugsa sær hesi ítøkiligu upplivingartilboð:

- Bátasmiðja, har føroyskir bátar verða smíðaðir.
- Smáttur til leigu eitt hugnaligt og aktivt vikuskifti saman við børnunum ella í sambandi við uppháling av bátinum.
- Camping, húsvognar.
- Sjóítrótt, t.d. drekasurfing, kaving, bátaleiga, kajakk- og kanoleiga, svimjing á sjónum.
- Wellness, heitir pottar, sauna.
- Matstova við serligum mati úr nærøkinum, t.d. kræklingi, øðum, jákupsskeljum o.t.
- Útferðartilboð, t.d. útferð við postbátinum Reynir.
- Bátastevna, regatta-sigling.
- Savningarøki hjá borgarum í kommununi.



*Sigling. Mynd Ole Jensen.*





*Matstova, havsvimjing. Myndir Armgarð Weihe og Andras Mortensen.*



*Øki 2: Frítíðar virksemi. Illustratión Heidi H. Poulsen.*

## Økisdisponering og byggisamtykt

Viðgerðin av kommunala økinum sunnan fyri hvalastøðina, nevnt øki 2, snýr seg um fyrilit í sambandi við broyting av byggisamtyktini fyri økið.

Nevndin ímyndar sær øki 2 disponerað nakað soleiðis:

1. Disponeringin av øki 2 eigur at taka støði í, hvussu øki 1 verður skipað, soleiðis at fata, at virksemi, ið eru mest tengd at ætlaða virkseminum í øki 1, verða staðsett næst øki 1, tvs. norðast í øki 2, meðan virksemi, ið hava minni samband við tað museala virksemið, verða staðsett sunnast í øki 2.
2. Atkoman til økini verður á markinum millum øki 1 og øki 2. Har kemur vegurin frá landsvegnum oman, har verður móttøkan til tað museala økið í einum móttøkubygningi, har sum Brandskúlin nú stendur, har verða parkeringspláss til bussar og bilar, og haðani verður koyrt suður í øki 2.
3. Norðasti parturin av øki 2 verður lagt av til staðseting og bygging í sambandi við sjóvinnusavn og økissavn. Rúm er helst ikki fyri øllum hesum sunnast í øki 1, og tí er neyðugt at koma inn í tað kommunala økið eisini.
4. Nevndin hugsar sær, at stórir bygningar standa longst frá sjónum niðan móti beninum, meðan smærri bygningar standa oman móti sjónum, hetta fyri at fáa byggingina at fella væl inn í lendið og ikki taka nakað frá upplivingini av hvalastøðini sum bygningaheild. Loyvdar byggihæddir og byggivíddir eiga at verða ásettar við byggisamtykt.
5. Longur suðuri í øki 2 verður líknandi bygging og økisdisponering, tillagað eftir tí vinnuliga virkseminum har, sum er minni skilt við tað museala virksemið norðanfyri. Av størri bygging kunnu hugsast hallir til handils- og verkstaðsvirksemi, t.d. bátaverkstøð, og øki at seta bátar og líknandi. Av smærri bygging oman móti sjónum kunnu hugsast lágir og smáir hugnaligir bygningar við ymsum virksemi, t.d. bátasmiðju, handli við skipsútgerð, útleiging av bátum og øðrum til sjóítrótt o.s.fr. Eisini kunnu her vera smá summarhús til leigu hjá eitt nú barnafamiljum í feriu. Loyvdar byggihæddir og byggivíddir eiga at verða ásettar við byggisamtykt.
6. Nevndin hugsar sær, at tað á sjónum út fyri øki 2 verða brúgvar, har fólk kunnu hava bátar liggjandi. Kanska verður neyðugt at gera ein bátahyl í tí sambandi. Hugsanin er eisini, at tað her skal vera møguligt at taka bátar upp og hava standandi til umvælingar um veturin.
7. Fyri at gera upplivingina av økinum á landi fjálgari enn nú skjýtur nevndin upp, at partar av uppfyllingini verður grivin upp aftur og havnarinnvik gjørd, eitt nú við drátti. Tilfarið kann ivaleyst endurnýtast í sambandi við havnargerðina annars, t.d. í einum brimgarði.
8. Sunnast í økinum oman móti sjónum er pláss til neystabygging og í líðini oman fyri pláss til bygging av t.d. smáttum til útleigan. Loyvdar byggihæddir og byggivíddir eiga at verða ásettar við byggisamtykt.
9. Sum nevnt meta vegamyndugleikar landsins, at um ferðslan til økið við hvalastøðina økist vegna økt virksemi, eigur nýggjur atkomuvegur av trygdaráðum at verða gjørdur til økið umleið 100 m sunnan fyri verandi íbinding í landsvegin. Hetta eigur tí eisini at verða havt í huga í sambandi við økisskipanina.
10. Samstarvið millum land, kommunu og privata vinnu krevur, at hugsað verður um, hvussu samstarvið skal verða skipað. Nevndin metir, at skilagott hevði verið at fingið í lag eitt samstarvsráð í sambandi við hetta, har kommunan mannar formanssessin.

Nevndin mælir tí kommununi til, at øki 2 verður skipað soleiðis

- at norðasti parturin verður lagdur av til savnsbygging.
- at miðparturin verður lagdur av til smávinnu í sambandi við frítíðar- og ferðavinnuvirksemi.
- at sunnasti parturin verður lagdur av til neysta- og smáttubygging.
- at skipað verður fyri miðvísari planlegging av hesum, so at økið gerst eitt lokkandi aktiv í sær sjálvum.
- at loyvdar byggihæddir og byggivíddir í teimum trimum økjunum verða ásettar í byggisamtykt soleiðis, at økið kemur at hóska til mentanarsøguliga bygningsumhvørvið á hvalastøðini.
- at smábátahavn verður gjørd út fyri økið.
- at lagt verður upp fyri, at íbindingin í landsvegin kann verða flutt umleið 100 m sunnari enn nú.







*Øki við Áir. Myndir Armgarð Weihe og Heidi H. Poulsen.*

# Skipan av savni, tørvur og kostnaðarmeting

Frammanfyri varð stutt greitt frá umvælingararbeiðinum, sum er í gongd í løtuni, og metta kostnaðinum av tí. Víst var eisini á, at talan er um bráðfeingis viðlíkahald, har endamálið er at tryggja bygningarnar, fáa teir tættar og steðga forfalli, og ikki at leggja nakað afturat so sum at innrætta teir til savn. Niðanfyri verður spurningurin um framtíðar nýtslu og kostnaðarmeting í tí sambandi nærri greinaður. Eisini skal verða mett um kostnað av byggi- og anleggsarbeiði, sum skotið er upp.

Av teimum 17 bygningunum á hvalastøðini við Áir er upprunalig innrætting og tólútbúnaður varðveitt í 10 teirra, meðan hetta ikki er ført í hinum 7. Tá eru manningarhotellið, har Dugni hevur skúla, og Búðin, sum var niðurrivin tíðliga í 1980-árunum í sambandi við bygging av brandskúlanum, ikki tald við.

Samlaða gólvvíddin í teimum 17 bygningunum er tilsamans umleið 1.414 $m^2$, soleiðis sundurbýtt

1. Bygningar, har upprunalig innrætting er varðveitt: 1.060 $m^2$
2. Bygningar, har upprunalig innrætting ikki er varðveitt: 354 $m^2$

Hugsanin er, at bygningar, har upprunalig innrætting til tólútbúnað er varðveitt, verða óbroyttir eftir bráðfeingis umvæling, sum er farin í gongd, og framsýndir soleiðis, sum teir eru, har tey vitjandi kunnu fáa innlit í verksmiðjuumhvørvið, sum einaferð var.

Hugsanin er, at bygningar, har upprunalig innrætting ikki er varðveitt, eisini verða óbroyttir eftir bráðfeingis umvæling, sum er farin í gongd, og í mestan mun nýttir soleiðis, sum teir eru til goymslur ella framsýningarhøli. Tað merkir, at ikki øll sløg av gripum ella framsýningum kunnu vera har, men einans tílíkt, ið tolir ráligt veðurlag.

Hóast íløgurnar í bygningar helst ikki verða fleiri enn tær, ið vóru nevndar í sambandi við bráðfeingis umvælingarnar, sum fara fram í løtuni, so skal kortini roknast við kostnaði í sambandi við gerð av framsýningunum og goymslunum, sum skulu vera har, so sum hillar, ljósseting, grafiskt arbeiði og annað tílíkt. Hvussu nógv hetta fer at kosta, er ikki gjørligt at siga nú. Hesar útreiðslur verða tí ikki tiknar við her, har einans íløgukostnaður verður mettur.

At bygningarnir á hvalastøðini í mestan mun verða hildnir soleiðis, sum teir upprunaliga vóru, har avleiðingin í savnshøpi er, at einans tílíkt, ið tolir ráligt veðurlag, kann verða goymt ella framsýnt í hesum hølum, merkir, at tørvur eisini er á nýbygging til framsýningar og goymslur, um eitt gott úrslit skal spyrjast burtur úr. Eisini er tørvur á nýbygging til starvshøli, tí smáir møguleikar eru at innrætta starvshøli í bygningunum á hvalastøðini sjálvari.

Í sambandi við hesa bygging er at viðmerkja, at hon ikki tørvar at verða gjørd í einum, men so hvørt, sum ráðini eru til tað og valt verður at umleggja tað museala virksemið hjá Søvnum Landsins og stovna nýtt lokalt savnsvirksemi. Tó eigur at verða ásannað, at bygging av húsi til umsiting og móttøku av vitjandi, m.a. savnsbúð og WC, hevur fremstu raðfesting og eigur at verða gjørd, áðrenn savnið letur upp. Raðfestingar í sambandi við hetta eiga at verða gjørdar í sambandi við planlegging longu frá byrjan.

Nevndin mælir tí til,

- at savnsbygging í sambandi við hvalastøðina við Áir verður gjørt stigvíst við støði í fíggingarmøguleikum og møguleikum at umskipa museala savnsvirksemið hjá Søvnum Landsins og at stovna yrkisligt savnsvirksemi lokalt í Sunda kommunu.
- at umsitingarbygningur við móttøku til vitjandi verður gjørdur áðrenn savnið letur upp.
- at fyrilit eiga at verða sýnd tílíkum raðfestingum í planlegging frá byrjan og harvið eisini byggisamtykt fyri økini, har savnsbygging verður ætlað.

Við støði í hesum metir nevndin, at tørvurin á savnsbygging er sum í talvuni niðanfyri, har eisini er mett hølistørv og kostnað við støði í mettum fermetrakostnaði fyri ávikavist

1. starvshølum og starvsstovum (20.000 kr/m$^2$)
2. goymslu uttan hitaskipan og klimastýring (10.000 kr/m$^2$)
3. goymslu og framsýning við hitaskipan og klimastýring (18.000 kr/m$^2$)
4. Uttandura framsýningarøki (300 kr./m$^2$)

Í talvuni niðanfyri er hølistørvur í sambandi við musealt virksemi og mettur kostnaður í sambandi við hesa bygging greinaður, og raðfest er, hvør bygging eigur at koma fyrst, og hvør bygging kann koma seinni.

| **Savnsbygging við Áir, tørvur og kostnaður** | **Raðfesting** | **m$^2$** | **Kr /m$^2$** | **Kostnaður** | |
|---|---|---|---|---|---|
| Fyrireiking í undirlendi (vatn, kloakk, el v.m.) | 1 | | | 1.000.000 | |
| Móttøka, savnsbúð, almenn wc | 1 | 100 | 20.000 | 2.000.000 | |
| Skrivstovur til uml. 2 fólk á 25 m$^2$ | 1 | 50 | 20.000 | 1.000.000 | |
| Kaffistova | 1 | 40 | 20.000 | 800.000 | |
| Fundarhøli | 1 | 40 | 20.000 | 800.000 | |
| Skráseting | 1 | 50 | 20.000 | 1.000.000 | |
| Starvsfólkarúm, reingerðarrúm, goymsla, gongdsøki v.m. | 1 | 50 | 20.000 | 1.000.000 | |
| 1. raðfesting til samans | | 330 | | | 7.600.000 |
| | | | | | |
| Skrivstovur til uml. 6 fólk á 25 m$^2$ | 2 | 150 | 20.000 | 3.000.000 | |
| Amboðsgoymsla, sjólívfrøði | 2 | 100 | 18.000 | 1.800.000 | |
| Preparatgoymsla og skolirúm, sjólívfrøði (evt. saman við Fiskaaling) | 2 | 150 | 18.000 | 2.700.000 | |
| Frystirúm | 2 | 30 | 18.000 | 540.000 | |
| Vátlaboratorium, hvalauppskurður o.t. | 2 | 90 | 10.000 | 900.000 | |
| Gripagoymsla, sjóvinnu- og økissavn (klimastýrd) | 2 | 500 | 18.000 | 9.000.000 | |
| Bátagoymsla (hjallur, bátar atkomuligir hjá almenninginum) | 2 | 350 | 10.000 | 3.500.000 | |
| Framsýningarhøll | 2 | 1.000 | 18.000 | 18.000.000 | |
| Uttandura goymsla (sjónnu- og økissavn) | 2 | 1.000 | 300 | 300.000 | |
| 2. raðfesting til samans | | 3.370 | | | 39.740.000 |
| | | | | | |
| Tilsamans, mett gólvvídd og kostnaður | | 3.700 | | | 47.340.000 |

Nevndin metir tí, at kostnaðurin av at fáa í lag musealt virksemi í sambandi við hvalastøðina við Áir, umframt tær 9,4 mió. kr., sum bráðfeingis umvælingarnar verða mettar at fara at kosta, verður

- 7,6 mió. kr. til savnsbygging í fyrstu atløgu. Harumframt skal roknast rakstrarkostnaður.
- 39,74 mió. kr. til savnsbygging í aðru atløgu, t.e. so hvørt sum raðfestingar fara fram í sambandi við alment sjóvinnusavn og lokalsavn og fígging fæst til vega.

Harumframt metir nevndin, at kostnaðurin av at fyrireika øki 2 til bygging er o.u. kr. 300/$m^2$.

# Bygnaður

Nevndin metir tað vera ynskiligt, at virksemini í økinum kring Hvalastøðina við Áir verða samskipað. Spurningurin er so, hvussu samskipanin skal verða skipað?

Omanfyri verður mælt til, at virksemið í øki 1 verður musealt virksemi, sum virkar eftir lógum landsins fyri tílíkt. Øki 1 umfatar í høvuðsheitum matr. nr. 100, sum Føroya Landsstýri eigur.

Omanfyri verður mælt til, at virksemið í øki 2 verður vinnuligt vinnuvirksemi. Øki 2 umfatar í høvuðsheitum matr. nr. 101b, sum Sunda kommuna eigur. Sunda kommuna er byggimyndugleiki í øllum økinum.

Nevndin metir, at hesi viðurskifti eiga at síggjast aftur í yvirskipaðu samskipanini.

Nevndin metir tí, at Mentamálaráðið og Sunda kommuna skipa eitt samstarvsráð at samskipa virksemini í økinum. Samstarvsráðið eigur at vera ráðgevandi hjá byggimyndugleikanum og landsmyndugleikum og fáa øll mál, sum viðvíkja planlegging í økinum, atkomuni til tað og nýtsluna av tí til ummælis.

Nevndin mælir tí til,

- at Mentamálaráðið og Sunda kommuna skipa eitt samstarvsráð at samskipa virksemini í økinum.
- at samstarvsráðið verður ráðgevandi hjá kommunalu byggimyndugleikunum og landsmyndugleikum í planlegging av økinum, atkomu og nýtslu av tí.

# Tilmæli

Viðv. Dugna og Brandskúlanum mælir nevndin til,

- at tað almenna savnsvirksemið verður í øki 1, sum umfatar matr. nr. 4a og 100.
- at tað vinnuliga virksemið verður í øki 2, sum umfatar matr. nr. 101b.
- at møguleiki skal vera fyri at flyta íbindingina í landsvegin umleið 100 m longur suður.
- at virksemið hjá Dugna við Áir ikki verður ávirkað av ætlanini, sum verður skotin upp.
- at um virksemið hjá Dugna flytur, verður bygningurin nýttur í almenna savnsvirkseminum.
- at virksemið hjá Brandskúlanum verður flutt.
- at bygningurin, har Brandskúlin hevur hildið til (bygningur nr. 19), verður tikin niður, og nýggjur bygningur bygdur, sum hóskar betur til umhvørvið á hvalastøðini og er nýtiligur til savnsvirksemi.

Viðv. savnsvirksemi mælir nevndin til,

- at alment sjóvinnusavn verður staðsett í sambandi við hvalasavnsumhvørvið við Áir.
- at sjóvinnusavnsvirksemið verður skipað undir Søvnum Landsins.
- at sjólívfrøði verður hugsað inn í sjóvinnusavnsvirksemið.
- at sjóvinnusavnsvirksemið verður staðsett í øki 1 sunnan fyri ánna, t.e. í økinum, har Brandskúlin nú stendur.
- at tað í økinum og møguliga í grannaøkinum (øki 2), sum kommunan eigur, verða bygd a) ein hjalslíknandi goymsla til bátar og annað stórgóðs, ið varðveitist í lutfalsliga ráum klima, b) ein turrgoymsla og amboðshøll við hitaskipan og hóskandi klimastýringum, c) ein framsýningarhøll og d) ein fyrisitingarbygningur við skrivstovum og starvsstovum. e) Eisini mælir nevndin til, at eitt øki verður sett av til at seta stórlutir uttandura, sum kann vera liður í framsýningarvirkseminum.
- at eitt bygdasavn verður skipað í Sunda kommunu eftir bygdasavnslógini.
- at ein savnvørður verður settur eftir vanligum fakligum treytum fyri savnsvirksemi at stíla fyri bygdasavnsvirkseminum, sum eisini umfatar at røkja mentanararvsáhugamálini hjá bygdunum í kommununi.
- at bygdasavnið verður staðsett á hvalastøðini við Áir.
- at uppgávan hjá bygdasavninum verður at lýsa søguna hjá kommununi og bygdunum í kommununi úr elstu tíð, men við serligum denti á ídnaðarsøguna.
- at økissavnsvirksemið í mestan mun verður samskipað við sjóvinnusavnsvirksemið hjá Søvnum Landsins.

Viðv. vinnuligum virksemi mælir nevndin til,

- at øki 2 við Áir verður skipað sum ein depil fyri frítíðarvirksemi knýtt at sjónum, ferðavinnu og mentanarsøguligum upplivingum við serligum atliti at sjóvinnu.
- at tað vinnuliga virksemið í øki 2 verður skipað soleiðis, at tað ikki er í andsøgn við málið at skipa ein depil fyri frítíðarvirksemi og ferðavinnu.

Viðv. økisdisponering mælir nevndin til,

- at byggisamtykt fyri økið verður tillagað samsvarandi.
- at gjørdar verða serligar reglur fyri bygging og skilhaldsreglur fyri virksemið í økinum.
- at norðasti parturin av øki 2 verður lagdur av til savnsbygging.
- at miðparturin av øki 2 verður lagdur av til smávinnu í sambandi við frítíðar- og ferðavinnuvirksemi.
- at sunnasti parturin av øki 2 verður lagdur av til neysta- og smáttubygging.
- at skipað verður fyri miðvísari planlegging av hesum, so at øki 2 gerst eitt lokkandi aktiv í sær sjálvum.
- at loyvdar byggihæddir og byggivíddir í teimum trimum økjunum í øki 2 verða ásettar í byggisamtykt soleiðis, at økið kemur at hóska til mentanarsøguliga bygningaumhvørvið á hvalastøðini.
- at smábátahavn verður gjørd út fyri øki 2.
- at lagt verður upp fyri, at íbindingin í landsvegin kann verða flutt umleið 100 m sunnari enn nú.
- at savnsbygging í sambandi við hvalastøðina við Áir verður gjørt stigvíst við støði í fíggingarmøguleikum og møguleikum at umskipa museala savnsvirksemið hjá Søvnum Landsins og at stovna yrkisligt savnsvirksemi lokalt í Sunda kommunu.
- at umsitingarbygningur við móttøku til vitjandi verður gjørdur áðrenn savnið letur upp.
- at fyrilit eiga at verða sýnd tílíkum raðfestingum í planlegging frá byrjan og harvið eisini byggisamtykt fyri økini, har savnsbygging verður ætlað.

Viðv. skipan av virkseminum í økinum kring hvalastøðina við Áir mælir nevndin til,

- at Mentamálaráðið og Sunda kommuna skipa eitt samstarvsráð at samskipa virksemini í økinum.
- at samstarvsráðið verður ráðgevandi hjá kommunalu byggimyndugleikunum og landsmyndugleikunum í planlegging av økinum, atkomu og nýtslu av tí.

Viðv. bráðfeingis umvælingum av hvalastøðini við Áir verður mett,

- at samlaði kostnaðurin verður umleið 13,7 mió. kr., harav Løgtingið fíggjar 6 mió. kr. í tíðarskeiðinum 2011-2013. Umvæling av tólum er ikki íroknað.

Viðv. kostnaði av at fáa í lag musealt virksemi í sambandi við hvalastøðina metir nevndin,

- at kostnaðurin verður 7,6 mió. kr. til savnsbygging í fyrstu atløgu. Harumframt skal roknast rakstrarkostnaður.
- at kostnaðurin verður 39,7 mió. kr. til savnsbygging í aðru atløgu, t.e. so hvørt sum raðfestingar fara fram í sambandi við alment sjóvinnusavn og lokalsavn og fígging fæst til vega.

MENTAMÁLARÁÐIÐ

ISBN-13 978-99918-852-4-7